Fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

verður søkt eftir lærara at undirvísa hetta skúlaárið í:

3. flokki í
- føroyskum
- kristni

og
- týskum í **8. og 9. flokki**
- søgu í **9. flokki**

Lønar- og setanartreytir:
Setnarbrotið er 0,85 ella 23 undirvísingartímar.

Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so er, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið er lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Umsóknir
Umsóknir við lívsrensli og avrriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi 8.september 2006**

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til
Marjun Holm, skúlastjóra, á tlf 302510 og 221466 ella
Bjørg A. Poulsen, varaskúlastjóra á tlf. 302510 og 518440.

Eisini ber til at senda teldupost til skúlan argskuli@post.olivant.fo

Almannastovan

Umsorganararbeiði 2007 – broyttar treytir og tíðarfreist

Umsóknarfreistin fyri at søkja um fíggjarligan stuðul til umsorganararbeiði 2007 er:

1. september 2006.

Almannastovan skal gera vart við, at broytingar eru hendar í treytunum fyri at fáa játtaðan fíggjarligan stuðul til umsorganararbeiði. Lógin og kunngerðin um umsorganararbeiði eru broyttar soleiðis, at nú kann stuðul bert latast til:

1. Mattænastu til fólkapensjónistar
2. Koyritænastu ella vitjunartænastu fyri pensjónistar
3. Dagtilhald fyri fólkapensjónistar ella minnisveik.

Stuðul kann ikki veitast til eldrafeløg, undirhaldandi tiltøk og onnur líknandi tiltøk ella fyriskipanir fyri pensjónistar.

Annars verður víst til kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2005 um stuðul til umsorganararbeiði, broytt við kunngerð dagfest 19. mai 2006. Henda er at finna á heimasíðuni hjá Almannastovuni www.almannastovan.fo ella á www.logir.fo undir Almannaverk – Almannaviðurskifti annars.

Umsóknir, har greitt verður frá, hvat virksemi, stuðul verður søktur til, skal innan 1. september 2006 sendast til:

Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
100 Tórshavn

Skrivstovufólk til Jarðfeingi.

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Jarðfeingi. Starvið verður at seta skjótast til ber. Talan er um farloyvisstarv fram til 07 mai 2007.

Uppgávur
Starvið fevnir í høvuðsheitum um bóking í FSL bókhaldsskipanini, umframt at taka lut í dagliga arbeiðinum á Jarðfeingi eitt nú móttøka, telefonavgreiðsla og skjalaskráseting.

Yrkislig førleikakrøv
Umsøkjarar skulu hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving ella royndir. Hava royndir og áhuga fyri bókhaldi og journalisering, umframt at duga væl føroyskt og enskt í skrift og talu. Eisini krevur starvið góðan teldukunnleika.

Persónlig førleikakrøv
Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, vera skilagóður, miðvísur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Løn og setanartreytir
Starvið er hálvtíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, CV og viðmælum verða at senda Jarðfeingi, postrúm 3059, FO-110 Tórshavn.

Umsóknirnar skulu vera Jarðfeingi í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. september 2006.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Bjørg Svabo á tlf. 357000 ella við telduposti til bjorg.svabo@jf.fo

JARÐFEINGI
FAROESE EARTH AND ENERGY DIRECTORATE

Brekkutún 1 · Hoyvík · Postsmoga 3059 · 110 Tórshavn · Tel. · Fax · jardfeingi@jardfeingi.fo · www.jardfeingi.fo

AUGUST KAPPING

"Eg elski mína mús..."
Royn tína mús á www.hotelforoyar.fo

Vinningur í august:
Vikuskifti á Hotel Føroyum fyri 2 fólk við morgunmati + bowlingkvøld fyri 2

Hvønn dag í august mánaða verða Sudoku uppgávur at Þnna í Sosialinum.

Jú þeiri uppgávur, tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 4. september kl. 10.00 og merkið bjálvan »Sudoku«.

Drigið verður fyrst í september.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar vera loystar.

Hotel Føroyar ★★★★
Tel 31 75 00

SUDOKU

9		4			6		5	
					5	1	4	7
3			2	1				8
	6	8			7		9	
5	9						2	1
	2		3			4	8	
6				8	1			9
1	7	9	5					
	4		7			6		2

SERA LØTT

				4	8		5	
		6			5		1	
7					6	4	2	3
	1	2				5		
			1		9			
		5				1	8	
5	8	3	7					1
	2		5			6		
	9		8	3				

LØTT

1	4		7			2		
	3				5	7	6	
				3	9			
							4	8
		3				6		
5	7							
			3	7				
	9	4	5				1	
		8			4		3	2

MIÐAL

	8	1			4		7	
9				1				
						2	9	
			6				8	5
	6			2			1	
4	5				1			
	2	7						
				6				8
	1		3			7	5	

TRUPUL

NAVN: _____ BUSTAÐUR: _____

TELEFON: _____

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin